VALGREINAR

# Íbúðarmøguleikarnir hjá okkum ungu!

**Kristoffur Gaardlykke**
*Valevni Javnaðarfloksins í Vágum*



Vit hoyra ofta fólk siga, at ung í Føroyum búgva alt ov leingi heima hjá foreldrunum, ikki eru eins sjálvbjargin sum ung aðrastaðni o.s.fr. Hesum eri eg fullkomuliga ósamdur í! Eg eri sannførdur um, at ungir føroyingar standa minst líka væl á egnum beinum, um ikki betur, enn ung í øðrum londum.

Grundin til, at okkara ungu hava so trupult við at flyta heimanífrá er uttan iva tann, at vit í dag hava ein íbúðarmarknað, har satt lógloysi og ræðandi órímiligir prísir valda. Tey ungu hava snøgt sagt nærum ongan møguleika at leiga sær eina íbúð at búgva í.

Ikki tí at tey ikki duga, tora ella vilja standa á egnum beinum - men av tí sera einføldu orsøk, at tey fíggjarliga ikki eru før fyri tí!

Hetta er avgjørt nakað, sum vit ungu, ið bjóða okkum fram til løgtingsvalið, eiga at taka upp! Eg vil við hesum lova, at eg vil gera mítt ítasta til, at ein íbúðarpolitikkur verður orðaður, viðgjørdur og settur í gildi! Harumframt vil eg eisini virka fyri, at okkurt verður gjørt frá landsins síðu, til tess at gera tað bíligari og harvið møguligari hjá okkum ungu at fara út at leiga.

Hetta er gjørligt við tínum stuðli á valinum 20. januar!

# Vágafólk krevja frágreiðing um Vágatunnilin

**Jóanis Nielsen**
*valevni Fólkafloksins í Vágum*



Beint undan jólahalguni ber Dimmalætting boð um, at Brunaumsjón Landsins enn ikki hevur góðkent Vágatunnilin. Petur Lava Olsen sigur: "Har skal gerast kempuarbeiði áðrenn hann fær góðkenningar" Ímeðan stjórin í P/f Vágatunlinum Dávur Reinert Hansen sigur: "Tað er ikki vist, at vit hava somu sjónarmið, sum tey í frágreiðingini frá Brunaumsjón Landsins"

Vágafólk og annars øll tey, sum ferðast undir Sundinum, eru sera ørkymlað av hesum úttalilsi.

Vit krevja at bæði Brunaumsjón Landsins og P/f Vágatunnilin siga okkum hvat liggur í hesum úttalilsi.

Tá ið spurnartekin verða sett vit trygdina, so halda vit at minsta krav er, at avvarandi myndugleikar geva okkum eina góða frágreiðing um, hvat liggur í hesum.

Mær rennur til hugs, um illviljin ímóti hesum projekti enn livir. Brunaumsjónarmaðurin var jú ein av starvsfólkunum á Landsverkfrøðingsskrivstovuni, sum við hond og fót arbeiddu ímóti leistinum, sum tunnilin er bygdur eftir. - Tí seti eg mær spurningin, kann tað vera so galið???

# Hvussu verða Framtíðar Føroyar??

**Eivinn Bringsberg**
*Valevni Miðfloksins í Norðoyða valdømi*

Nógvar annaleiðis áskoðanir um lívsvirðir og nógv rák uttanífrá hevur hótt samfelag okkara tey seinastu árini.

Hetta er kanska ein avleiðing av globalisering og tí nútímans tøkni, sum ger, at vit dagliga verða ávirka av nærum øllum heiminum, inni í okkara egnu heimum.

Familjan er ein grundarsteinur undir samfelag okkara og hevur verði fyri mongum álopi tey seinastu árini.

Her hugsi eg um tær mongu skilsmissurnar, at tað er nærum ótíðarhóskandi at fara í hjúnarlag saman, børn verða fødd uttanfyri tryggu rammarnar í hjúnarbandinum og sum tí ofta ikki hava bæði foreldrini at halla seg til.

Fólk av sama kyni halda saman sexuelt og eru á tann við at forkvakla tað, sum skaparin gav boð um frá byrjan av:

Sum mann og kvinnu skapti hann okkum og í orði Guds stendur:

Og Gud signaði tey. Gud segði við tey: „Nørist, vaksið í tali, fyllið jørðina og gerið tykkum til harrar hennara,

Familja er Guds fyriskipan og grundstøði undir samfelagnum. Fara vit at nema við og lóggeva fyri ørðum áskoðanum, rotnar samfelagið upp innanífrá.

Hetta merkir ikki at vit skulu á nakran hátt síggja niður á annarleiðis hugsandi, men við tolsemi royna at venda gongdini inn á tað, sum rætt er.

Tað var gleðiligt at hoyra í sjónvarpinum herfyri at allir flokkar á tingið siga seg stuðla uppundir tað kristnu lívsáskoðannina og vilja verja tað ófødda barni.

Serliga tá vit kunnu minnast á eina kanning, sum Dimma gjørdi fyri uml. einum ári síðan, sum vísti at bara Miðflokkurin hevði eina greiða støðu hesum viðvíkjandi.

Tað sær tí út, at Miðflokkurin hevur drigið hinar flokkarnar við sær tann rætta vegin, soleiðis sum verturin í sjónvarpinum hevði hug at fáa tað til.

Góðu veljarar í Føroyum, Miðflokkurin hevur sett sær fyri at verða ein rødd á Føroya løgtingið, sum minnir á at vit byggja okkara samfelag á tey etisku virðir sum standa í Orði Guds.

Hetta vil ikki siga at vit halda okkum verða einsamallar um hesa uppgávu.

Men fyri okkum er hetta eitt aðalmál

Miðflokkurin hevur eina sera fjølbroytta stevnuskráð sum umfatar øll týðandi mál í landi okkara.

Tað verði seg fíggjarmál, fiskivinnumál, almannamál, tjóðarmál, vinnumál, heilsumál o.a.

Henda skráð stendur m.a.á heimasíðu floksins www.midflokkurin.fo <http://www.midflokkurin.fo>

Við at velja Miðflokkin, ert tú við til at seta ein verjugarð runt okkara land móti hugsjónum, sum eru niðurbrótandi fyri tað komandi ættarliði – børn okkara.

Við at velja Miðflokkin, ert tú við at seta fólk inn á ting, sum vilja føra ein skilagóðan politikk á oman fyri nevndu økjum.

Harrans signing í nýggja árinum, gott val

# Virðisøking í okkara høvuðsvinnu

**Niklái Petersen**
*løgtingsmaður, valevni Tjóðveldisfloksins í Norðurstreymoy*



Útflutningsvirðið í okkara høvuðsvinnu í 2003 bleiv áleið 300 milliónir lakari enn í 2002. Tá ið Føroyar stórt sæð bara liva av tí, sum kemur úr havinum, so burdi hendan væntaða niðurgongdin sjálvandi sett ferð á orðaskiftið, um hvat ið er til ráða at taka, soleiðis at sum mest fæst burturúr tilfeinginum, ið nú einaferð kemur inn um lúnningina.

Sum støðan er í løtuni, tykist tað sum um tann politiska skipanin ongan politikk hevur á økinum. Tað rekur alt fyri vind og vág, sveiggini á sølumarknaðum avgera til eina og hvørja tíð hvussu livistøðið í landinum skal vera. Gransking man í hesum samanhangi vera eitt tað fyrsta man hugsar um, tá man veit, at ein nokk so stórur partur av tilfeinginum verður tveittur í havið aftur.

Tær almennu Føroyar hava ongan granskingarpolitikk. Ein roynd var gjørd í 2001, tá ið Tjóðveldisflokkurin ígjøgnum landsstýrismannin í mentanarmálum fekk uppskotið um Graskingargrunn Føroya samtykt á Føroya Løgtingi. Meiningin var frá byrjan av, at hesin grunnur skuldi vera samskiparin og drívmegin undir allari almennari gransking í Føroyum. Men orsakað av mótstøðu úr flestu øðrum ráðum, gjørdist hendan hugsan ikki til veruleika í fyrstu atløgu, og granskingin liggur framvegis taðað sundur í almennu umsitingini, har ið ongin veit frá øðrum at siga. Ístaðin fyri eina granskingarumsiting eru nú fleiri fylgisveinar í skipanini, við hvør sínari umsiting. Hetta eigur at fáast í rætt lag, samstundis sum meiri fíggjarlig ferð eigur at verða sett á, soleiðis at granskingin kann gerast eitt íkast til okkara høvuðsvinnu.

Vit vita, at hjá grannunum fyri vestan Íslandi er einasta væntaða búskaparliga ekspansiónin í fiskivinnuni tey komandi árini úrslitið av gransking í hvussuleiðis virðini av tí sum í dag verður tveitt burtur kann optimerast. Tað sama er sjálvandi galdandi í Føroyum. Tí má satsast á granskingarøkinum. Høvdavirkið í Leirvík er ein sólskinssøga, sum vísir hvussu lættliga úflutningsvirðið í høvuðsvinnuni kann økjast, um hugflog, vilji, satsing og kapitalur taka lógvatak saman.

Gransking er sjálvandi ikki einasta svarið, men hon kann flyta fjøll í høvuðsvinnuni, um allir partar seta seg niður og royna at finna útvegir fyri hvussu vit sleppa burturúr traditionellu hagreiðingini av okkara tilfeingi. Sum nú í størri og størri mun snýr seg um at bløðga, kryvja og síðani at flyta rundan fisk út av landinum. Føroyar eru í vaksandi mun við at menna seg til eina útróðrarstøð í norðurhøvum fyri evropeiska marknaðin. Tað hvørki er ella verður haldbart í longdini.

Tað eru uttan iva nógvar góðar kreftir í Føroyum, sum sita inni við góðum hugskotum og ráðum um hvussu vit loysa hesar trupulleikar og skapa møguleikar fyri eini menning innan granskingarøkið. Tað er tó av stórum týdningi at traditionella vinnan vinnur sum mest av peningi, annars verður trupult at skipa eina vinnu oman fyri høvuðsvinnuna, tá ið allur hin váðafúsi kapitalurin eftirhondini er at finna ímillum teir, ið har virka. Sjálvandi er útlendskur kapitalur eisini ein møguleiki, men higartil hevur hann í stóran mun bara havt áhuga í verandi vinnu í Føroyum, og tað í sær sjálvum broytir einki, heldur ikki fyritreytirnar fyri einum sjálvberandi búskapi í landinum.

Onnur mál sum hava áhuga í hesum sambandinum er sjálvandi góðska, flutningsmøguleikar, bæði sjó- & loftvegis, nýggjur kapitalur, einskiljing av almennum rakstrargørnum, broytingar í lógini um vinnuligan fiskiskap, soleiðis at sum mest av nattúru tilfeinginum kemur til høldar. Tjóðveldisflokkurin vil arbeiða fyri eini menning innan granskingarøkið.

Gott val øll somul, setið ein sterkan tjóðveldisflokk á ting 20. januar.



VALGREINAR

# Hava allir sovið í tímanum?

**Ása Olsen**
*valevni Sjálvstýrisfloksins í Suðurstreymoy*



Nú valstrýðið er í hæddini er ikki eiti á at síggja, hvussu tinglimir brádliga eru vaknaðir, tá tað snýr seg um eldraøkið.

Hetta seinasta árið hevur støðan verið framúr vánalig, og hava vit, sum arbeiða innan øki aftur og aftur roynt at gjørt vart við støðuna, bæði gjøgnum fjølmiðlar og alla staðni har vit kunnu, tó uttan úrslit.

Tað er ongin loyna, at nú Heimahjálpin hevur 30 ár á baki, er hendan skipan nærum syndrað, men hvar hava talsmenn og kvinnur fyri hesi skipan verið?

Lættast er at senda svartaper víðari til onnur, tó skal ikki dyljast, at andstøðan hevur verið líka tigandi sum samgongan viðv. eldraøkinum. Hettar fær ein at spyrja, um tingfólk hava hildið seg havt góða tíð, til at gera ein vørr um hesi viðurskiftir, tá val nærkaðist aftur, tó vóru tey tikin á bóli hesuferð, tí at val varð skrivað út í úrtíð, so nú má okkurt gerðast.

At pengar mangla og fólk liggja óhjálpin er onki nýtt. Eisini teir nógv umrøddu bíðlistarnir til heimahjálp hava verið at finna allastaðni í landinum hettar seinasta hálva árið, men hvør hevur givið sær far um tað?

At tað nú brádliga eru økisskrivarar og onnur, ið kunnu úttala seg í fjølmiðlunum um, at tey eru troytt av støðuni, vísir, at nógv vápn kunnu nýtast fyri at fáa veljaran at hoppa uppá vallyftir, ið bert galda uppundir valið.

Tað er mín vón, at øll tey gomlu og teirra avvarðandi hugsa seg um, og spyrja seg sjálvan hvat sitandi tingfólk bæði í samgongu og andstøðu hava gjørt fyri at finna eina loysn á støðuni.

Minnist til øll vallyftini, ið vóru givin til seinasta val viðvíkjandi eldraøkinum.

At enda vil eg bert minna á, at tað eru vit, ið arbeiða innan øki, ið kenna veruliga tørvin, og tí kunnu verða við til at loysa trupulleikarnar.

# Fólkaskúli, ársverk og trivnaður

**Katrin Dahl Jakobsen**
*løgtingskvinna og valevni Javnaðarfloksins í Suðarstreymi*



»Komið og stríðist um framtíðina«, var ein av yvirskriftunum í røðuni, sum táverandi landsstýrismaður í skúlamálum helt á árliga aðalfundi Føroya Lærarafelags í mai í fjør. Og stríggið bleiv tað so sanniliga! Men eitt stríð við framtíðina heldur enn um framtíðina. Neistin, sum festi í tað heila, var ársverkið, sum varð trýst ígjøgnum ímóti viljanum hjá lærarunum og sum eisini fall á frumatkvøðu. At koma malandi við nýggjari arbeiðstíðarskipan í úrtíð, eftir at skúlarnir hava skipað skúlaárið og heldur ikki taka hædd fyri broyttum fortreytum og møguligum meirkostnað er skilaleyst. Líka so skilaleyst var tað, at skipanin fór at virka fyri allar skúlar. Tað hevði verið betri at roynt hana á nøkrum fáum skúlum fyrst - stórum, meðalstórum og smáum. Ein hóast alt hóvligari leið at farið.

Vit eiga sum skjótast at endurskoða ársverkið, sum fór at virka 1. aug í fjør og kanna eftir, um nýggja skipanin hevur bøtt um trivnaðin í fólkaskúlanum. Ein trivnaðarkanning varð gjørd í 2002 sum vísti, at stórur partur av lærarum kundu hugsað sær at søkt annað starv. Hetta er so mikið álvarsligt, at ikki ber til at sita á boðunum. Javnaðarflokkurin hevur sum eitt av fremstu málum at virka fyri tí góða skúlanum, sum skapar rúm fyri læring fyri øll.Tað er einki minni enn treytin fyri tí góða samfelagnum. Tað er her vit klekja teir veruligu spírarnar, og teir skulu vera bæði sterkir og glaðir. Tað gerst bara í góðum anda, sum er merktur av virðing fyri næmingum, lærarum og foreldrum og har trivnaðurin blómar. Hesum vil Javnaðarflokkurin veruliga stríðast fyri.

# Føroyskt Fíggjareftirlit og Innskjótaratrygdargrunnur

**Bjarki Mohr**
*valevni hjá Javnaðarflokkinum í Suðurstreymi:*



Er tað skilagott at yvirtaka Fíggjareftirlitið, og hava vit fíggjarligan førleika til at varveita trygdina hjá tí einstaka innskjótaranum ?

Eitt av teim yvirtøkumálum, ið undanfarna samgonga hevur fyrireika, er ein yvirtøka av Fíggjareftirlitinum. Tað sigst, at leisturin er klárur og at nú væntar bert ein støðutakan.

Føroysku fíggjarstovnarnir eru undir eftirlitið av danska fíggjareftirlitinum, hvørs endamál er at hava eyguni eftir fíggjarkervinum, soleiðis at ymsu peningastovnarnir halda seg innan lógarásettu karmar. Ásetingarnar seta krøv til peningastovnarnar um m.a. soliditet (styrki) í mun til útlán, upplýsingarskyldur, gegni o.m.a., umframt at eftirlitið eisini veitir ráðgeving í samband við lógarsmíð og lógarviðgerð.

Við allari viðring fyri tí arbeiðið ið er gjørt, so tykjist tað mær allíkavæl undarligt, um eitt fátal av føroyskum embætisfólkum - eftir so stutta tíð - hava megna at klárlagt eina nøktandi yvirtøku av einum so týdningarmiklum øki.

Fíggjareftirlitið er gamalt og rótfest, við stórum royndum. Hesar eru ikki fyngnar til vega eftir stutta tíð, og tær eru grundaðar á eitt væl umhugsa lógargrundarlag, ið - bert partvíst - er sett í gildi í Føroyum.

Spurningurin er eisini um vit ikki hava ov fáar peningastovnar í Føroyum, til at varðveita ein nøktandi kunnleika hjá teim í skulu manna eitt tílíkt eftirlit. Og hvussu megna vit at varðveita gegni.

Vit eiga at gera okkum púra greitt, at yvirtaka vit eftirlitið av fíggjarøkinum, so vera vit óyva eisini at stovnseta ein nøktandi innskjótaratrygdargrunn, og spurningurin er um vit hava fíggjarliga orku til endamálið. Seinasta boðið eg hoyrdi um støddina á einum føroyskum grunni varð eitt stað millum 300 milliónir kr.

Men her liggur ein stórur - og eftir mínum tykki - óumhugsaður vandi. Skulu vit stovnseta ein tílíkan grunn, er neyðugt at hesin megnar at tryggja innistandandi peningin hjá - minst - øðrum av teim stóru peningastovnunum. Tá tosa við um eina upphædd, ið liggur áleið 1,5 milliard kr.

Tað er so, at kemur ein av teim stóru peningastovnunum í fíggjarligar trupulleikar, er ongin peningastovnur í Føroyum at býta vandan - ella eina møguliga yvirtøku - við, og samstundis økist trýsti á restina av kervinum.

Verandi skipan á økinum ber, ídag, ikki stórar útreiðslur við sær, og eiga vit tí at umhugsa hesa støðuna nágreiniliga, innan vit taka onnur stig. Tað tænir ongum endamálið, bert at yvirtaka tí vit í stoltleika vilja hava egið eftirlit. Vit hava eisini skyldu til at meta um peningaliga førleikan hjá landinum, og at tryggja peningin hjá tí einstaka.

# Eina betri miðfyrisiting

**Rasmus Niclasen**
*Valevni Javnaðarfloksins í Vágum*



Hesi seinastu 6 árini hava vit upplivað ein nærum ótálmaðan vøkstur á miðfyrisitingini. Tað man kennast mangum fólkafloksmanni beiskur smakkur í munninum, at vit javnaðarmenn mugu traðka til fyri at greiða hesa fløkjuna.

Ikki tí, longu tá Normann Christensen kom við sínum uppskoti um endurskipan av miðfyrisitingini, rópti Javnaðarflokkurin varskó. Her hevur gingið sjón fyri søgn. Tað tykist sum miðfyrisitingin er uppbygd eftir tilvildarligum telvingum fyri at fáa eina politiskan kabal at ganga upp.

Javnaðarflokkurin vil hava eina betri miðfyrisiting, sum hóskar til føroysk viðurskifti og er fyri fólkið.

Skipanin við teimum níggju aðalráðunum, har hvørt ráðið ber seg at sum eitt sjálvstøðugt landsstýri, skal broytast, soleiðis at vit fáa eina miðfyrisiting, sum virkar sum ein samskipað eind.

Vit skjóta upp 6 aðalráð, samansett av málsøkjum, sum náttúrliga hoyra til hvørt ráðið. Tey skulu í samstarvi virka við skipaðum felagsfunktiónum. Hetta kundi verið innan lógardeild, vekslara og móttøku, fyri at nevna nøkur dømi.

Endamálið er ikki minst at tryggja okkara borgarum eina góða og rættvísa tænastu, har ikki er neyðugt at ganga frá Peri til Pól, men fáa avgreitt síni ørindi á einum og sama stað.

# Aftur í 80 árini???

**Anfinn Olsen Søldarfjørð**
*Valevni Tjóðveldisfloksins í Eysturoy*

Læs í bløðunum, eitt valevni fyri Sambandsflokkin skrivar um rækjuflotan.

Hann skrivar, at um Sambandsflokkurin kemur til ræði aftaná 20 jan, so vilja teir gera alt fyri at bjarga rækjuflotanum. ( studningur )

Eg skilji hann væl,at hann er keddur um at tað ikki gongur so væl hjá rækjuflotanum,tað eri eg eisini.

Men vit mugu fyri alt í verðini ikki innføra studningin aftur,tá fara vit so rúkandi aftur í 80 árini, hvar í allar slangur gingu niður í landskassan.

Hetta er tað íð Sambandsflokkurin vil.

Tað er júst hettar íð Tjóðveldisflokkurin hevur arbeitt við , nemliga at vinnan skal klára seg sjálv, uttan studning.

Lata vit fyrst einum bólki, hvat so við tí næsta? Og so fer alt á glið aftur.

Hinvegin trúgvi eg einki uppá, at vit missa allan rækjuflotan og harvið øll søgulig rættindi allastaðni. Tíðin hjá okkum menniskjum er ein sinuskurva, tað eru upp og niðurgangstíðir; men fyri tað um rækjuflotin nú er í einum aldudali, merkir tað ikki at hann verður verðandi har niðri, tað kemur vend í aftur.

Okkurt skip missa vit; men tey koma aftur.

Takkað verði einum sterkum og føstum fíggjarmálaráðharra í Tjóðveldisflokkinum, at vit nú eiga nærum 2. milliardir á bók.

Ágangurin at sleppa at opna slúsurnar verður øðiligur.